TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## "Leyst" sløkkiliðsfólk

Søkt verður eftir "leysum sløkkiliðsfólki" til sløkkiliðið hjá Tórshavnar kommunu.

Talan er um fólk til sløkkistøðirnar í Nólsoy, Hesti/Koltri, Velbastað/Kirkjubø og í Kaldbak

**Høvuðsuppgávur**
Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, m.a. alt vanligt sløkkiliðsarbeiði, brunafyribyrgjandi uppgávur og bjargingaruppgávur.

**Førleikakrøv**
Tú ert likamliga væl fyri og kanst útvega heilsuváttan til roykkavara við setan.
Ynskiligt er, at tú hevur handverkaraútbúgving sum t.d. bilmekanikari, maskinsmiður ella líknandi.
Fyrimunur er, at tú hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg.
Roknað verður við at tú innan 3 mðr. hevur víðkað fyrstuhjálparprógv.

**Annað**
Umsøkjari eigur at hava bústað minni enn 5 minuttir frá sløkkistøðini.
Eisini skal umsøkjari útvega reina revsiváttan frá politinum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett skjótast til ber, og lønt sambært avtalu.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, varasløkkiliðsstjóra, tlf. 302100

**Umsókn**
saman við viðmælum, revsiváttan og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 26. september 2005 kl. 12.00. Viðmerk á umsóknina »Leyst sløkkiliðsfólk«.

**Sløkkiliðið**

Støðin hevur útgerð til hjálp í sambandi við ferðsluóhapp, oljudálking á sjógvi og landi, húsaskaðar og froskmannaútgerð.

Tað eru 34 fólk knýtt at støðini. 19 eru í føstum starvi, harav 8 eru knýtt at eini vaktarskipan. 1 fólk er á døgnvakt.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Leiðarastarv til frítíðarundirvísingina

Starvið sum leiðari fyri frítíðarundirvísingina í Tórshavnar kommunu, Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla er leyst at søkja skjótast gjørligt.

Undir ábyrgd leiðarans í mentamáladeildini í Tórshavnar kommunu skal leiðarin hava dagligu leiðsluna og fyrisitingina fyri allari frítíðarundirvísing í kommununi.

**Søkt verður eftir leiðara, sum:**
- hevur hug og hegni at leiða, dugir at samstarva og er fyrikomandi
- hevur fyrisitingarligan kunnleika og hug og hegni at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- er námsfrøðiliga og undirvísingarliga nýskapanarsinnaður
- er førur fyri at menna frítíðarundirvísingina og skipa undirvísingarliga tilboðið til tørvin hjá borgarunum í kommununi
- er kveikjandi í sínum arbeiði í frítíðarundirvísingini
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og menna samstarvið millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum og dugir at loysa trupulleikar
- kann skapa virðing fyri skúlanum og umstøðunum hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- tolir broytingar starvinum viðvíkjandi

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalærara- ella aðra samsvarandi útbúgving og fyrisitingarligar royndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, teldupostur: gunnleyg@torshavn.fo, ella Jákup Simonsen, leiðara í mentamáladeildini, teldupostur: jakup@torshavn.fo tlf. 302010.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera, Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 4. oktober 2005.

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómskúli og Tórshavnar Listaskúli**

eru frítíðarskúlar undir býráðnum, sum hava tilboð til borgaran um undirvísing eftir arbeiðstíð, og stór tilgongd er til allar lærugreinirnar.

Her er talan um handverk og handarbeiði av ymiskum slag, bóklig undirvísing, tilboð til rørslutarnað og menningartarnað, frítíðarvirksemi til børn og ung og mangt annað.

Í skúlanum ganga yvir 3.000 næmingar, og har starvast um 200 lærarar.

Skrivstovan er á Frúutrøð saman við skrivstovuni hjá Tórshavnar Musikkskúla.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo






MIÐVÁGS KOMMUNA

## Skrivstovufólk

Søkt verður hervið eftir

**skrivstovufólki hálva tíð**

til kommunuskrivstovuna í Miðvági at byrja skjótast gjørligt.

Lønin er sambært 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 332429 ella borgarstjóran tlf. 221429.

Umsøknir vera, saman við upplýsingum um royndir, útbúgving og møguligum viðmælum, at senda til Miðvágs kommunu, 370 Miðvági í seinasta lagi 22. september 2005 kl. 1500.

Bygdaráðið skilar sær rætt til, um ikki nøktandi umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.

**Miðvágs kommuna**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Frítíðarskúlan Túgvuna eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.
- einum køksfólki at arbeiða 10 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið sum pedagogur verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara ella Guðrið Nicodemusadóttir, varaleiðara á tlf. 318382.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Túgvuni, Gundadalsvegur 4, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. september 2005.

Í frítíðarskúlanum arbeiða 5 fólk. 29 børn úr 1. og 2. fl. ganga í Túgvuni

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

GEVIÐ BLÓÐ

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo